


## Altjóða teknikapping

Ert tú millum 10 og 16 ár? Dámar tær at tekna? So hevur tú møguleikan at royna teg í altjóða teknikapping. Send eina mynd til Listasavn Føroya innan 25. oktober, og kanska verður tín mynd eina av teimum tíggju føroysku myndunum, sum sleppur við til stóra altjóða teknikapping og listaframsýning í India. Kappingin er býtt í tríggjar aldursbólkar, 10 -12 ár, 12 – 14 ár og 14 -16 ár. Tey elstu skulu tekna á eitt A3 pappír, meðan hini skulu tekna á A4 ark. Meira fæst at vita á www.snar.fo ella við at venda sær til Listasavn Føroya.

# Listasavnið er eisini fyri børn

**Listasavn Føroya hevur trý ymisk tiltøk í samband við Savnsfagnaðin í oktober. Í heystferiuni verður myndaveiða við lærandi avbjóðingum fyri børn og foreldur, eftir heystfrítíðina verður eitt slag av listaskúla við fokus á orku, og seinast í oktober er innlatingarfreist til stóra altjóða tekningkapping, har 10 føroysk børn sleppa at sýna fram í India**



*Oggi Lamhauge, savnslærari, framman fyri mynd hjá Beintu av Reyni, sum er sera væl dámd millum føroysk børn. – Listin hjá Beintu er nýrealistisk, og børn halda hana vera spennandi, tí myndirnar eru atkenniligar og hava ein tekniseriustíl. Og so eru evnini eisini øðrvísi og áhugaverd hjá børnum at tosa um, staðfestir savnslærarin*

SAVNSFAGNAÐUR

*Dorit Hansen*
*www.snar.fo*

Børn eru kreativ og opin, men tey fylla sjálvdan nógv á almennum listaframsýningum. Hendan mánaðin verður støðan tó væntandi øðrvísi, í øllum førum á Listasavni Føroya, sum hevur fyrireikað seg til ta heilt stóru barnainnrásini í heystfrítíðini.

– Vit kundu hugsa okkum at verið eitt vanligt útferðarstað hjá føroyskum familjum, og vit arbeiða eisini við ætlanum um at gera savnið meira barnavinarligt. Savnsfagnaðurin í heystferiuni er tí eitt gott høvi at vísa, hvussu savnið eisini kann vera spennandi fyri børn, greiðir Oggi Lamhauge, savnslærari á Føroya Listasavni frá.

Í heystferiuni verður savnið opið hvønn dag millum 11 og 16 við spennandi myndaveiðu til børn og ung í øllum aldursbólkum. Myndaveiðan er leitan og uppgávur til ymisk listaverk á savninum. Til savnsfagnaðin fyri skúlaflokkum eftir heystfrítíðina skipar Listasavn Føroya fyri spennandi listaavbjóðingum, har børn bæði fáa frálæru og sjálvi sleppa at royna seg sum listafólk. Harumframt samskipar Listasavnið eisini føroysku luttøkuna í altjóða teknikapping fyri børn, har 10 føroysk børn sleppa at luttaka í stórari framsýning í India.

### Myndaveiða í heystferiuni

Oggi Lamhauge, savnslærari, greiðir frá at tiltakið í heystferiuni, er skræddaraseymað til familjur við børnum í ymiskum aldri.

– Vit hava gjørt eitt lítið hefti við 12 ymiskum myndum, og hvør mynd hevur spurningar, sum eru tillagaðir fimm ymiskar aldursbólkar.

Tey yngstu børnini fáa til uppgávu at finna myndina á savninum. Børn, sum eru byrjað í skúlanum fáa heilt einfaldar spurningar um myndirnar, t.d. hvussu nógvar dúgvur eru á mynd hjá Díðriki á Skarvanesi. Børn, sum duga at lesa og skriva, verða spurd eitt sindur minni einfaldar spurningar, sum til dømis hvørjum tilfari ein standmynd hjá Janusi Kamban er úr. Tey royndu børnini skulu taka støðu til samanspæl millum tilfar og innihald, meðan tey elstu børnini fáa meira avbjóðandi perspektiverandi spurningar.

Øll fáa sama lítla faldara, sum er lættur at ganga runt við á savninum, og spurningarnir til ymisku aldursbólkarnir eru frámerktir við ymiskum litum.

– Í heystferiuni koma foreldur við børnum, og tey ganga sjálvi runt í savninum, men vit eru eisini her, og bæði børn og vaksin eru vælkomin at spyrja okkum, um tað er okkurt, sum tey ikki skilja, ella okkurt sum tey kundu hugsa sær at vita meiri um.

Umframt myndaveiðuna verður eisini ein teknikapping í ymiskum aldursbólkum. Eitt horn í forhøllini er innrættað til teknikappingina, sum er býtt í fimm aldursbólkar. Vinnarnir í hvørjum bólki fáa millum annað bøkur frá savninum. Umframt lokalu kappingina, hava børnini eisini møguleika at luttaka í innleiðandi umfari til altjóða kapping, har 10 børn sleppa við. Meir um hetta seinni í greinini.

### Listaavbjóðingar eftir heystferiuna

Vikuna eftir heystferiuna hava skúlarnir heystfagnað, og tá skipar Føroya Listasavn fyri eitt slag av listaskúla. Evnið á savnsfagnaðinum er orka, og savnslærarin, Oggi Lamhauge, hevur valt tríggjar myndir, sum knýta seg at trimum sløgum av orku, alduorku, motororku og sólorku.

– Vit byrjaðu at fyrireika okkum til savnsfagnaðin longu áðrenn summarferiuna, og vit halda, at vit hava sett eina góða skrá saman, sigur Oggi Lamhauge.

Listaverkini, sum eru vald til listaskúlan, eru Aldur hjá Janusi Kamban, Bretskur trolari hjá Jack Kampmann og Hagamynd hjá Arnoldi Vegghamar. Á skúlaportalinum, www.snar.fo, hevur Listasavnið lagt innleiðandi kunning og uppgávur til tey trý listaverkini, sum lærarar og næmingar skulu hyggja eftir, áðrenn tey koma á savnið.

Og tá flokkarnir hava vitjað, sæð listaverkini og hoyrt smáar fyrilestrar um teir tríggjar listamenninar, kunnu tey aftur fara inn á Snar, har Listasavnið eisini hevur lagt tríggjar kreativar uppgávur.

– Listaskúlin gevur næmingum kunning um føroyska list og um orku í list, men vit ynskja eisini at geva teimum møguleika at royna egnar listarligar gávur. Okkara uppgáva er at vísa føroyska list, men eisini at geva íblástur til kreativt arbeiði, og tað er í tí anda at savnsfagnaðurin er fyrireikaður, sigur Oggi Lamhauge.

### Føroyskar tekningar til India

Altjóða kappingin er býtt upp í tríggjar aldursbólkar. Fyrsti aldursbólkurin er børn millum 10 og 12 ár, næsti bólkurin eru børn og ung millum 12 og 14 ár, og elsti bólkurin eru ung millum 14 og 16 ár. Teir yngru bólkarnir skulu tekna á eitt A4 pappír, meðan elsti bólkurin skal nýta A4 ørk.

– Freistin at lata tekningar inn er 25. Oktober. Børn eru vælkomin at lata myndir inn, tá tey vitja okkum á Savnsfagnaðinum, men eisini børn, sum ikki hava møguleika at vitja okkum hesar dagarnar, kunnu luttaka og senda myndir til okkara, greiðir Oggi Lamhauge frá.

Í altjóða teknikappingini eru fleiri evni at velja ímillum: vatn, lívfrøðiligt margfeldi, orka og rusk. Vinnandi føroysku myndirnar sleppa við á stóra altjóða listaframsýning í indiska høvuðsstaðnum, og á heimasíðuni, www.ryanworld.org, ber til at lesa meira um kappingina

Oggi Lamhauge vónar at teknikappingin, listaveiðan og listaskúlin draga nógvar familjur á Listasavnið hendan mánaðin, og hann leggur dent á, at ambitiónin er, at Listasavn Føroya verður eitt vanligt útferðarstað fyri føroyskar familjur.

– Okkara ætlan er, at kreativa hornið í forhøllini verður tøkt alt árið. Eg kundi hugsa mær, at hetta var eitt stað, har børn kunnu seta seg og tekna við íblástri frá øllum tí, sum tey síggja her. Og at tey eisini hava møguleika at arbeiða trídimensionelt við legoklossum í einum liti, umframt at tey kunnu seta seg og hyggja í listabøkur av ymiskum slagi.

Seinasta ár vóru á leið 500 børn og vitjaðu Listasavnið í heystfrítíðini, og hóast húsið ikki er stórt, bar hetta væl til, sigur savnslærarin.